# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

30. september fingu Halgerð L. Jacobsen og Leif Niclassen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4400 gr.

1. september fingu Vígdis Eysturdal og Rúni Niclassen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4860 gr.

2. september fingu Marit Christiansen og Andras í Frammistovu, Kirkju, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigðaði 5100 gr.

2. september fingu Jacoba Torgunn Winther og Jón Tór Baldvinsson, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2900 gr.

3. september fingu Hanna Olsen og Ásmundur Hansen, Søldarfirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

4. september fingu Malena Petersen og Jóhan Heini Heinesen, Viðareiði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4100 gr.

4. september fingu Eyð B. og Rodmundur Nielsen, Glyvrum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3825 gr.

4. september fingu Noomi og Karl Gregersen, Syðrugøtu, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

4. september fingu Virginia Tess Boxer og Jógvan Sune Danielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3450 gr.

4. september fingu Katrin Dagbjartsdóttir Johansen og Mats Brisenfeldt, Tórshavn, ein son. Hann eigur Bjartur.

4. september fingu Rakul og Rói Lindberg, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4050 gr.

5. september fingu Nena og Heri Thomsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

5. september fingu Durita og Johnny í Grótinum, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4725 gr.

5. september fingu Valborg D. og Karl L. Thomassen, Kollafirði, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2630 gr.

5. september fingu Ragna Gøthe og Áslakk Jacobsen, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

6. september fingu Karina og Mikkjal Pauli, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3500 gr.

6. september fingu Jóhanna og Mortan Rasmussen, Kollafirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4100 gr.

7. september fingu Eyðna Danielsen og John Vilhelmsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3650 gr.

8. september fingu Súsanna Káradóttir og Dávur K. Glerfoss, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

8. september fingu Lisbeth Vang, Klaksvík, og Regin Dalsgarð, Argjum, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3800 gr.

8. september fingu Joan Mortensen og Alex Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3550 gr.

8. september fingu Elinborg Nygaard, ættað av Tvøroyri, og Lars Løgstrup Sørensen, Odense, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4420 gr.

9. september fingu Randi Borðoy og Jan Mortensen, Oyrarbakka, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4350 gr.

# Nýggir parkeringsansarar í Havn



*Ann-Mari Jensen og Thordur Thorsteinsson, parkeringsansarar í Tórshavnar Kommunu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

1. september 2003 vórðu tvey nýggj fólk sett í starv sum parkeringsansarar í Tórshavnar Kommunu. Tey eru Thordur Thorsteinsson úr Havn og Ann-Mari Jensen av Sandi.

Thordur er 44 ára gamal, sonur Maritu, f. Hentze, og Georg Thorsteinsson í Havn. Hann hevur handilsútbúgving og rak tógvhandilin Igloo í Havn í 9 ár.

Ann-Mari er 39 ára gomul, dóttir Sólrun, f. Johannesen, og Ásbjørn Jensen á Sandi. Hon er útbúgving sum almanna- og heilsuhjálpari og hevur búð í Kepmannahavn í 8 ár, har hon lærdi og arbeiddi á einum røktarheimi.

Parkeringsansararnir hoyra undir Føroya Landfúta, og Ann-Mari og Thordur arbeiða út frá Politistøðini í Havn.

## Vilmund Niclasen 60 ár



Leygardagin 13. september fyllir Vilmund Niclasen í Hoyvík 60 ár. Vilmund er sørvingur, sonur Valborg, f. Thomasen, úr Sandavági og Heina Martin Niclasen úr Sørvági.

Sum ungur flutti hann til Danmarkar, har hann var búsitandi á Rødby Gård nøkur ár.

Sum 16 ára gamal kom hann heim aftur og búsettist hjá foreldrunum í Sørvági, har hann varð kendur fyri at hjálpa, serliga einsomum og eldri fólki í bygdini við at sláa, velta ella rudda fyri tey. Hann hevur ruddað í mongan kjallara í Sørvági, og var "Kalø" trillibøran honum eitt sera hent amboð.

Vilmund hevur altíð verið morgunmaður, og mangan var tað so, at hann hevði leitað sær út á Sørvágskei at fiska, áðrenn húsfólkið var komið upp.

Vilmund er sera húsligur, og honum dámar væl at hava tað reint og ruddiligt rundan um seg.

Í 70-unum flutti hann til Havnar, har hann búði í nøkur ár, til hann flutti norður til Eiðis. Har búði hann eisini í nøkur ár. Seinnu árini hevur hann búð í sambýlinum á Mýrini í Hoyvík, har hann trívist ómetaliga væl. Mangan túrin kring landið og uttanlanda við hevur hann verið saman við teimum, ið búgva og arbeiða á Mýrini.

Vilmund er ein fríur útvendur persónur, sum tosar við øll fólk, men honum dámar avgjørt ikki at fólk floyta. Mong munnu tey vera, sum hann hevur roynt at selt smáar málningar til, og hava tey ognað sær eitt tjaldur, ið hann hevur málað.

Vilmund er hittinoraður og liggur væl fyri at gera smár yrkingar - ella "rím".

Vilmund hevur sera góða rødd, og dámar honum eisini væl at syngja, og hevur hann sína dagligu gongd í kirkju ella á møtir.

Vilmund arbeiðir á Verkstaðnum Vón á Argjum og býr á Sambýlinum í Hoyvík.

Dagurin verður hildin fyri innbodnum í Sambýlinum á Mýrini 6 í Hoyvík.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hanna Mortensen 65

Dagurin, hon varð fødd, gjørdist kendur í føroyskari søgu nøkur ár seinni. Hanna Mortensen í Havn er nevniliga fødd 14. september í 1938.

Hon er ættað úr Klaksvík. Mamman var Anna Kathrina Joensen úr Funningsfirði. Hon var seinna kona Gunnar Kallsberg, sum var lorvíkingur, men búsettist í Klaksvík og arbeiddi sum formaður hjá Kjølbro. Gunnar hevði verið giftur við Elin Sofíu Poulsen úr Kollafirði. Tey fingu børnini Poul, Einar og Ellu. Í seinnu giftu vóru 4 børn: Gutti, Hanna, Kaj og Anfinn, sum er løgmaður.

Hanna tók studentsprógv á Skansabrekku í 1956. Á studentaskúlanum hevði hon Arnbjørn Mortensen av Tvøroyri sum lærara, og nakað seinni rann saman teirra millum. Tey giftust og búsettust í Havn. Hanna og Arnbjørn fingu synirnar Andras og Gundur. Fyri nøkrum árum síðani doyði Arnbjørn knappliga.

Hanna hevur havt skrivstovustørv og verið virkin á øðrum økjum eisini, m.a. hevur hon verið virkin í Norrøna Felagnum. Hon hevur starvast í mong ár á Fornminnissavninum.

## Anders Harboe Ree 60



Mánadagin 15. september fyllir Anders Harboe Ree í Havn 60 ár. Hann er sonur Odu og Helge Harboe Ree. Oda var dóttir Karina og Jógvan Kjølbro í Klaksvík. Hon giftist til Noreg og búði í Lillehammer. Síðani búði hon í Havn í mong ár.

Anders tók matematiskt studentsprógv í Hoydølum í 1963. Hann fór til Danmarkar at lesa og tók embætisprógv sum lækni. Hansara spesiali er røntgen, og nú hevur hann skjótt í mong ár verið yvirlækni á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum. Andres hevur stóran áhuga fyri fuglum og gongur nógv í haganum. Eisini hevur hann summarhús í Tjørnuvík.

## Holgar Nielsen 50 ár



Í dag, leygardagin 13. september, fyllir Holgar Nielsen í Vestmanna 50 ár. Holgar er Vestmenningur, sonur Bodil og Kjartan Nielsen.

Sum ungur arbeiddi hann á Vestmanna Skipasmiðju, har hann lærdi til sveisara. Hann er eisini útbúgvin byggiteknikari. Hann arbeiddi á plastverksmiðjuni Tór Plast í Vestmanna frá fyrst í 80-unum til 1992/93. Í 1993 var hann í Grønlandi, har hann var við til at starta upp eina plastverksmiðju. Á sumri 1994 fór hann til Danmarkar, har hann eisini arbeiddi á eini plastverksmiðju, til hann kom aftur til Føroya í 1996 og fekk starv hjá Kemilux í Havn, har hann arbeiðir sum virkisleiðari í dag. Holgar er giftur við Andreu Julionnu, f. Olsen, úr Vestmanna, tey eiga fimm børn.

Holgar spældi í nøkur ár við VÍF, og var hann ein av bestu hondbóltsspælarunum í landinum og ein framúr góður svimjari, og fekk hann onkra gullmedalju í svimjing. Hann er eisini dugnaligur til at gera mat, og plagar hann at hjálpa beiggja sínum, Gunduri Nielsen, at matgera til veitslur o.l. Eisini er hann stórskemtari og dugir væl at undirhalda á veitslum og samkomum.

## Prógv

Dora Lómstein hevur tann 20. august 2003 tikið prógv sum farmaseutur á Danmark Farmaceutiske universitet.

## Andlát

5. september
Maria Vágstún, Klaksvík, ættað úr Soylu á Sandi, 80 ár
6. september
Olivia Karlson, Tvøroyri, 86 ár
7. september
Kjartan Strøm, úr Vági, 47 ár
Halgrím Mogens Skoráadal, 67 ár
Tóri Mortensen, fyrrverandi skræddari, ættaður úr Øravík, búsitandi á Bornholm, 79 ár
9. september
Edmund Gerdum, av Strondum, 81 ár
10. september
Hanus Sofus Hansen, ættaður úr Mikladali, 87 ár
Frida Elisabeth Justinussen, vanliga nevnd Betta Højgaard,lærari í Klaksvík, 90 ár
11. september
Eli Jakobsen, Sandvágur, ættaður av Slættanesi, 64 ár

## Dagurin

**13. september. Cyprianus,** deyður í 258. Hann var sakførari og lærari í Kartago, men 45 ára gamal gjørdist hann kristin og varð tvey ár seinni valdur til biskup. Skrivaði nógvar lærubøkur og søgubøkur, og handrit hansara eru týdningarmiklar keldur til søguna hjá fornkirkjuni. Varð tikin av døgum undir Valerianus keisara.

**14. september. Dýrd krossins.** Eisini rópt **krossmessu um heystið**. Krossurin, sum drotningin Helena fann, varð tikin og fluttur burtur av heidningum, men funnin aftur og førdur til Jerusalems. Dagurin verður hátíðarhildin til minnis um hesa hending.
14. september er eisini dagurin, tá ið atkvøðugreiðsla í 1946 var í Føroyum um samband við Danmark ella loysing.

**15. september. Mariumessa síðari.** Dagur hildin til minnis um tað sálarneyð, sum gekk á Mariu Moy fyri tær líðingar, sonurin mátti tola. Í summum álmannakkum stendur eisini navnið **Áskel**, ið er sama navnið sum svenska navnið Eskild. Trúboðarin Eskild varð steinaður í hel við Eskilstuna í Svøríki í umleið 1080.
*Áskel* merkir gudahjálmur.



# Sólgerð Djurhuus

### fyristøðukvinna á Ellis- og Umlættingarheiminum

### f. 04.02.41 – d. 03.07.03

Góða Sólgerð.

Undarliga óveruligt kennist tað at tú ikki ert millum okkum longur!

Tað verða skjótt 19 ár, síðani tú var sett sum leiðari á Umlættingarheiminum við V. U. Hammersheimbsgøtu og legði tú stevið har so væl og umhugsið, at har bleiv gott at vera, bæði hjá bú- og starvsfólki.

Nøkur ár seinni, tá so Ellis- og Umlættingarheimið vóru løgd saman, átók tú tær hesa uppgávu við! Tað skein ígjøgnum alt, sum tú hevði við at gera, at tú vart ein eyðmjúkur persónur. Tey gomlu stóðu tínum hjarta nær, og rættindi teirra var tú altíð klár at verja. Siðsemi var í hásæti, og tað kunnu vit bara hava størstu virðing fyri.

Sólgerð, tú gjørdi ikki nógv burtur úr tær sjálvari, men harafturímóti vísti tú bæði umsorgan og áhuga fyri familju tíni og starvsfólkunum og teirra familju. Tá ið á stóð, vart tú altíð klár við eini hjálpandi hond. Sjálv bar tú sjúku og mótgongd í tolni. Tú var ikki ein, ið dámdi at standa fram, helst tvørtur ímóti, men arbeiðið kravdi hetta til tíðir. Og so hevði tú hendan eginleikan, sum næstan er við at doyggja út, sum fekk tey tú hevði »undir« tær, at slappa av saman við tær. Einki við at gera »honnør« nei! Tað er bara je! Tað verður sagt um summi, at tey eru heldur »kantut«! Tú var »rund« Sólgerð, og kanska til tíðir alt ov góð av tær! So er tað sagt.

Palli, eftir øll hesi ár hava vit ikki kunnað annað, enn lagt til merkis hvør ómetaligur stuðul, tú hevur verið Sólgerð, og ikki at gloyma allar tær ferðir tú hjálpti til á bæði ein og annan hátt í sambandi við hugnakvøld, jólahald, bara fyri at nevna nakað! Vit hugsa ofta um teg og tann sakn tær hevur verið fyri, má Guð styrkja teg og hjálpa tær at líta frameftir, hóast alt!

Sólgerð! Takk fyri at tú var akkurát sum tú var!

Friður veri yvir minninum um teg!

N. B. Einaferð segði tú, kanska mest sum í spølni, men tað vóru nøkur, ið festu sær tað í minnið! Tá ið je fari til gravar, skulu tygur syngja hendan sangin!

*Tá ið endar mítt stríð og útrunnin mín tíð*
*skal eg náa ta himmalsku strond.*
*Jesus eyga mítt sær, og tá vísir hann mær*
*naglamerkini í síni hond.*

Niðurlag:
*Eg skal ganga við lívsvatnsins strendur*
*hoyra pálmanna friðsæla sús*
*eingin synd eingin sorg*
*er í himmalsins borg*
*men bert songur sum havsbylgjubrús.*

**Starvsfólkið á Ellis- og Umlættingarheiminum í Havn**